

ÁRSFRÁGREIÐING 2020-2021

Aðalfundurin 24.02.2021

SÁTTMÁLI SAMEINDU TJÓÐA UM RÆTTINDI HJÁ EINSTAKLINGUM, IÐ BERA BREK

MEGD arbeiðir miðvíst við at minna á niðurstøðurnar úr ST og fyri at ávirka almenna myndugleikan at arbeiða við at gera neyðugar broytingar fyri at tryggja, at arbeitt verður út frá sáttmálanum.

www.megd.fo

Innihald

1 Virksemið hjá MEGD 2020-2021 2
1.1 Starvsnevndin 2
1.2 Skrivstovan 2
1.2.1 Fylgjarakort 3
1.2.2 Parkeringskort 3
1.3 Fíggjarviðurskiftir 3
1.4 Loyvi frá Dátueftirlitinum og trygdarskoðan 4
1.5 MEGD blað um sjálvboðið arbeiði 4
1.6 Altjóða dagur teirra, ið bera brek 4
2 ST- sáttmálin 4
2.1 Hagtøl og lýsing av brekøkinum 6
2.2 Vitjan á Tekniska skúla í Klaksvík, Miðnám á Kambsdali og Tofta skúla 7
3 Formansfundir 7
4 Lógararbeiði 7
5 Rættindi og luttøka 7
5.1 Samskiftisdepil 7
5.2 Bústaðarviðurskiftir 8
5.3 Atkoma 8
5.3.1 Atkomuligar matstovur 8
5.3.2 Atkomuligir túrar í føroysku nátturúni 8
5.3.3 Bussarnir atkomuligir 8
5.3.4 Luttøka á arbeiðsmarknaðinum 8
5.4 Verja og rætt at atkvøða 9
5.5 Verkfall 9
5.6 Fyritíðarpensjón og gjald fyri heimahjálp 9
5.7 Framtíðarfullmakt 10
5.8 Negativ renta 10
6 Korona 10
7 Ymiskt 10

1 Virksemið hjá MEGD 2020-2021

1.1 Starvsnevndin

Í starvsnevndini hjá MEGD sita teir av aðalfundinum valdu limir: Forkvinnan og 4 limir.

Starvsnevndarlimir verða valdir fyri tvey ár ísenn, og kunnu verða afturvaldir eina ferð.

Forkvinnan/maðurin verður vald/ur fyri trý ár í senn, og kann veljast aftur.

Starvsnevndin skipar seg á fyrsta fundi eftir ársaðalfundin við næstformanni.

Øll viðkomandi mál verða viðgjørd í starvsnevndini, og hevur starvsnevndin ein fund um mánaðin, tó undantikið í juli. Lýsti aðalfundurin 1. apríl 2020 varð útsettur orsakað koronu og varð hildin 10. juni á Hotel Føroyum, har møguligt var at halda neyðuga frástøðu.

Tey, ið hava mannað starvsnevndina síðan aðalfundin í 2020, eru:

Tóra við Keldu, forkvinna

Róa Midjord, næstforkvinna

Randfríð S. Sørensen

Hallur Thomsen

Anna Petersen

Fía Petersen, tiltakslimur

Durid Johannesen, tiltakslimur

Í november 2020 tók Fía Petersen, tiltakslimur, sæti í nevndini fyri Hall Thomsen.

1.2 Skrivstovan

Tóra við Keldu er forkvinna í MEGD. Hon er at hitta á skrivstovuni týsdag og mikudag.

Á skrivstovuni starvast Jónvør Christiansen, aðalskrivari og Steindóra á Stongunum, skrivstovufólk. Gullbjørg Rasmussen er reingerðarfólk.

Virksemið á skrivstovuni snýr seg um umsiting av parkerings- og fylgjarakortum, móttøku av viðskiftafólki, telefonsamskifti, ráðgeving til limafeløg, almennar myndugleikar og privatpersónar.

MEGD fær ymiskar fyrispurningar frá privatfólki, stovnum og myndugleikum. MEGD tekur sær so vítt møguligt ikki av einstaklingamálum uttan so, at tað hevur serligan almennan áhuga. MEGD er av tí áskoðan, at limafeløgini eru betri før fyri at loysa einstaklingamál.

Skrivstovan ger hagtøl yvir, hvussu nógv venda sær til felagið um árið. Talan er mest um føroyingar og harafturat koma áheitanir frá útlendingum.

Heimasíðan
MEGD hevur eina virkna heimasíðu, sum er umráðandi sum samskifti úteftir. MEGD hevur eisini eina virkna síðu á Facebook og Instagram.

Húsið
Fleiri av limafeløgunum nýta hølini í MEGD, og hevur nógv virksemið verið í húsinum, nú fleiri limafeløg skipa fyri sjálvhjálparbólkum. Somuleiðis er møguligt hjá øðrum at leiga hølini. Feløgini, sum hava skrivstovu í MEGD húsunum, eru: Sinnisbati, Gikta- , Diabetes-, Hjarta- og Psoriasisfelagið. Alzheimerfelagið og ADHD felagið hava høli saman, og somuleiðis hava Heilafelagið og Parkinsonfelagið og Epilepsifelagið og Autismufelagið hølir saman.

MEGD húsið hevur fingið fleiri ábøtur.

Hoyriviðurskiftini í stovuni vórðu bøtt í samstarvi við Hoyrnina og Ljóðtøkni.

Ljóðviðurskiftini í hølunum undir stovuni, har Alzheimerfelagið og ADHD felagið hava skrivstovu, eru munandi bøtt. Bjálvað er millum hæddirnar, *troldtekt* lagt undir loftið, og hølið er málað. Umvælingar eru eisini gjørdar í fýrrúminum í kjallaranum.

1.2.1 Fylgjarakort
Síðan skipanin varð sett í verk, hava uml. 448 fólk, ið bera brek, fingið fylgjarakort. Í 2019 vóru avtalurnar um fylgjaraskipan millum MEGD, Atlantic Airways og Smyril Line endurnýggjaðar. Avtalan við Føroya Kommunufelag varð endurnýggjað í 2018.

1.2.2 Parkeringskort
Síðan skipanin við parkeringskort varð sett í gildi hava 490 fólk fingið parkeringskort. Fólk hava vent sær til MEGD um møguleikan at fáa útflýggjað stovnskort. Við verandi kunngerð hevur tað ikki verið møguligt, tí eitt parkeringskort er persónligt. Men nú er broyting í kunngerðini á veg við nýggjum ásetingum um stovnskort, har sambýlir fyri rørslutarnaði og røktarheim hava møguleika at søkja um stovnskort, har tað eru ein ella fleiri borgarar knýttir at stovninum, sum eru sera illa gongdir, hava varandi niðursett evni at virka ella onnur líknandi heilsulig viðurskifti, sum í stóran mun skerja evnini ella ger tað trupult at ferðast, og sum lúka krøvini um útgávu av parkeringskorti.

1.3 Fíggjarviðurskiftir
Stuðulin yvir fíggjarlógina fyri 2020 var 1,65 mill. Við støði í lóg um ítróttavedding fær MEGD tillutað 5% av veddingarpengunum. Upphæddin fyri 2020 var 720.000 kr. Vit hava ikki fingið at vita enn, hvussu stór upphæddin fyri 2021 verður. Veddingarpeningurin kemur bæði MEGD og limafeløgunum til góðar. Fáir fótbóltsdystir hava verið í ár, so væntast kann, at upphæddin fyri 2021 verður minni.

Býtislykilin
Sambært viðtøkunum hjá MEGD, skal aðalfundurin taka støðu til býtið av fíggjarliga stuðlinum til

limafeløgini, eftir at raksturin hjá MEGD er frádrigin. Aðalfundurin 2020 samtykti uppskotið frá Starvsnevndini einki at gjalda í **Limagrunnin**, men at tilsvarandi varð goldið út beinleiðis til limafeløgini, sum sostatt fingu meira.

Aðalfundurin skal eisini taka støðu til, hvør upphædd skal fara í **Verkætlanargrunnin**. Einki varð koyrt í Verkætlanargrunnin í 2020.

Uppskot til nýggjan býtislykil 2021 verður lagt fram á aðalfundinum.

1.4 Loyvi frá Dátueftirlitinum og trygdarskoðan

MEGD umsitur umsóknir til parkerings- og fylgjarakort, sum inniber viðgerð av viðkvomum persónsupplýsingum. MEGD søkti í september 2019 Dátueftirlitið um loyvi til at viðgera viðkvæmar upplýsingar. MEGD gjørdi tær broytingar, sum lógin um viðgerð av persónsupplýsingum krevur.

Sum eina eyka KT trygd bílegði MEGD eina trygdarskoðan frá Elektron, sum var 2. sept. 2020 Eftir tilráðingum hevur MEGD gjørt víðari trygdarfyriskipanir sambært eftirlitinum so sum kryptering av øllum teldunum, lyklaskáp og brandvarnarar. 1. januar kom nýggj dátuverndarlóg í gildi. MEGD fer í tí sambandi at gera broytingar, og fáa til vega fráboðan um fjarspor og samtykki frá brúkarunum at samla upplýsingar.

1.5 MEGD blað um sjálvboðið arbeiði

MEGD blaðið kom út altjóða dag teirra, ið bera brek 3. desember. MEGD blaðið viðger evnið sjálvboðið arbeiði við denti á sjálvhjálparbólkar. Blaðið verður sent út til limafeløgini, allar viðkomandi almennar og privatar stovnar og myndugleikar.

Blaðið fæst við at venda sær til skrivstovuna. Blaðið kann eisini lesast á heimasíðu okkara undir SAVN.

1.6 Altjóða dagur teirra, ið bera brek

Dagurin varð hátíðarhildin í MEGD húsinum 3. des. 2020. Orsakað av koronu var tiltakið ikki alment, men bleiv stroymt, so møguleiki var hjá øðrum at fylgja við. Yvirskriftin var "Týdningurin av sjálvbodnum arbeiði". Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýriskvinna setti dagin og Laura Apol, aðalskrivari í Sinnisbata, hevði framløguna *Hvat drívur verkið, og hvør er úrtøkan?*
Bárður á Lakjuni hevði tónleikainnslag og Jónvør Christiansen, aðalskrivari í MEGD, hugleiddi um evnið *Saman um eina góða søk*. Tóra við Keldu, forkvinna, beyð vælkomin og tók saman um.

2 ST- sáttmálin

Í 2019 var MEGD til hoyring hjá ST-nevndini við støði í frágreiðing við evnislista "List of Issues"[1], sum vísir á avbjóðingar á brekøkinum. Í frágreiðingini varð víst á, at enn eru avbjóðingar hjá persónum, ið

[1]MEGD: file:///C:/Users/J%C3%B8rgen/Downloads/%C3%8Dkast%20%C3%BAr%20F%C3%B8royum%20-%20List%20of%20Issues%20(4).pdf

bera brek í Føroyum. Føroyska frágreiðingin er partur av frágreiðing, ið er gjørd saman við limafeløgunum og meginfeløgunum í Danmark og Grønlandi.

Føroya landsstýri lat í apríl 2020 ST eina frágreiðing um, hvat ið verður gjørt fyri at halda skyldur Føroya sambært ST-sáttmálanum. Frágreiðingin frá Føroya Landsstýri kann lesast á heimasíðuni hjá AMR og MEGD[2].

MEGD arbeiðir miðvíst við at minna á niðurstøðurnar úr ST og fyri at ávirka almenna myndugleikan at arbeiða miðvíst við at gera neyðugar broytingar, fyri soleiðis at tryggja, at arbeitt verður út frá sáttmálanum og niðurstøðunum.

Mannarættindi

Uttanríkis- og mentamálaráðið heitti við ársenda 2020 á MEGD og limafeløgini at lata inn skrivliga frágreiðing um mannarættindastøðuna í Føroyum. Í februar 2021 skulu Føroyar lata yvirskipaða frágreiðing um mannarættindastøðuna i Føroyum, sokallaða Universal Periodic Review (UPR), inn á triðja sinni, og í hesum sambandi varð, eins og í 2010 og 2015, skipað fyri almennari hoyring. Endamálið var, at borgarar og áhugabólkar fingu høvi at siga sína hugsan um mannarættindi í Føroyum. Vegna COVID-19 varð hoyringin hesaferð tó skrivlig, t.v.s. at skipað varð ikki fyri almennum orðaskifti sum undanfarnu ferðirnar. MEGD og limafeløg lótu frágreiðing inn í desember.

Samskipandi eind

MEGD fegnast um, at á vári 2019 varð Samskipandi eindin sett. Nýggj nevnd varð vald í 2020, sum er farin til verka, og 6. oktober 2020 vitjaði nevndin MEGD, har møguleiki var at samskifta um evnir í ST sáttmálanum. MEGD sær fram til, at Samskipandi eindin fer at orða brekpolitiska virkisætlan sambært samgonguskjalinum, sum sigur, "*at ein yvirskipað brekpolitisk virkisætlan fyri Føroyar skal gerast" (Samgonguskjal 2019-2023, s. 13).*

Teksting og teksnmálstulking í KVF

MEGD fegnast um, at fleiri sendingar verða tekstaðar og teknmálstulkaðar. Tó eiga fleiri sendingar at verða teknmálstulkaðar og tekstaðar. Sambært samgonguskjalinum 2019-2023 skal Teknmálstulking og føroyskur tekstur í sjónvarpinum styrkjast. Ein ætlan um "talu til tekst" fyri sjónveik verður stuðlað.

MEGD fegnast um, at tíðindafundir um støðu Føroya í samband við COVID-19 smittuna hava verið teknmálstulkaðir og live-bloggaðir, soleiðis at hoyriveik fingu beinleiðis frásøgn frá tíðindafundinum.

MEGD harmast um, at gudstænastan á Ólavsøku 2020 ikki var teknmálstulkað. Sendingin bleiv tekstað, men var tekstingin als ikki nøktandi, har ein mátti bíða út við hálvan tíma inn í sendingina, áðrenn tekstur kom á. Prædikan varð tekstað.

[2] AMR: https://d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net/media/13842/fr%C3%A1grei%C3%B0ing-fr%C3%A1-f%C3%B8roya-landsst%C3%BDri-til-st-s%C3%A1ttm%C3%A1la-um-r%C3%A6ttindi-einstaklinga-i%C3%B0-bera-brek.pdf

MEGD var á fundi við Ivan Niclasen og Kára Sólstein saman við Deyvafelagnum, Teknmálstulkatænastuni og Hoyr um avbjóðingarnar við áheitan um betringar av tíðindaflutningi hjá KVF.

Teknmálstulkatænastan hjá AV hevur ta stóru avbjóðing, at tað mangla tulkar. MEGD vónar, at myndugleikin setir út í kortið munadygga tilgongd, har fleiri teknmálstulkar verða útbúnir.

Sambært samgonguskjalinum skal *Deyvatulkingartænastan,* sum eitur *Teknmáls- og tulkatænastan, styrkjast* (2019-2023, s. 14). Fyri trimum og einum hálvum ári síðan bleiv føroyskt teknmál endiliga viðurkent sum føroyskt mál, men fígging er ikki sett av til menning av og undirvísing í føroyska teknmálinum. Vónandi verður fígging sett av til hetta, og neyðugir batar í eygsjón.

Skúli og brek

MEGD fegnast um, at tað í samgonguskjalinum 2019-2023 er niðurfelt, at vit framhaldandi eiga at stuðla skrivi- og lesiveikum næmingum, soleiðis at teir kunnu nema sær útbúgving á jøvnum støði við onnur. Harafturat, at skúlatilboðini til teir næmingar, sum hava menningartarn og koma úr fólkaskúlanum, verða ment. Hóast framstig eru á økinum, eiga betringar at fremjast, so skúlatilboðini bæði í Fólkaskúlanum, Miðnámi og Setrinum verða tillagað, so tey taka atlit til allar næmingar óansæð avbjóðingar.

Hagtøl

MEGD hevur verið á fundum við Mentamálaráðið um hagtøl (grein 31) t.d., hvussu nógvir næmingar í fólkaskúlanum hava serliga skipað skúlatilboð.

MEGD hevur fingið upplýst frá Mentamálaráðnum, at tað vóru 189 næmingar í fólkaskúlaaldri, sum fingu tilboð út um vanliga fólkaskúlatilboðið á t.d. serstovum og serskipanum. Viðmerkjast skal, at talið byggir á eina støðulýsing í august 2020, og tølini broytast alla tíðina.

Mannarættindaeind

MEGD var á fundi við Jenis av Rana í 2019 um grein 33 í ST sáttmálanum, at eingin mannarættindaeind er í Føroyum og vísti á grønlendsku loysnina um talsfólk. Grønland er harafturat partur av Institut for Menneskerettigheder, og Føroyar hevur einki samsvarandi. MEGD hevur fylgt málinum, og fingið at vita, at arbeitt verður við eini loysn.

Tó er einki ítøkiligt úrslit enn, og MEGD hevur aftur vent sær til Mentamálaráðið, og aftur fingið at vita, at arbeitt verður við málinum.

2.1 Hagtøl og lýsing av brekøkinum

Sambært grein 31 í ST sáttmálanum skulu limalondini átaka sær at savna hóskandi upplýsingar, eisini hagtals- og granskingartilfar, sum ger tey før fyri at orða og seta í gildi reglur, ið seta sáttmálan í verk. Í Føroyum mangla vit hagtøl fyri brekøkið. Sum áður umrøtt mangla vit eina demografiska lýsing og tørvslýsing av økinum. Høvdu vit hagtøl, var lættari at fáa eina mynd av støðuni.

Nakað av føroyskum tilfari er. Granskingardepilin fyri økismenning og MEGD (tá MBF) stóðu í 2007 fyri at fáa eina kanning gjørda um livikorini hjá fyritíðarpensjónistum í Føroyum. Tað var ein spurnarkanning, sum Olga Biskopstø og Martha Mýri stóðu fyri. Kanningin varpaði ljós á viðkomandi evnir á brekøkinum.

Í samstarvi við Setrið, fer MEGD undir kanning av livikorum hjá fyritíðarpensjónistum, og verður tað aftur Olga Biskopstø, sum stendur fyri kanningini. Kanningin verður gjørd í 2021. MEGD hevur fingið stuðul frá Betri stuðulsgrunninum og Sjúkrakassagrunninum til verkætlanina.

MEGD hevur fingið kunning um aðrar verkætlanir so sum granskingarverkætlan um børn, sum bera brek og familjur teirra í Føroyum og eina granskingarverkætlan um, hvussu rørsla og virkin luttøka gagna útsettum bólkum og hvørjir lutir eru við til at stimbra og varðveita rørslu og virkna luttøku.

2.2 Vitjan á Tekniska skúla í Klaksvík, Miðnám á Kambsdali og Tofta skúla

MEGD var á vitjan á Tekniska skúla í Klaksvík, sum arbeiddi við áhugaverda evninum *at vera uppá pláss, geva pláss, gera pláss, útnytta pláss og finna pláss*. MEGD var á vitjan á serbreytini á Kambsdali, sum arbeiddi við ST- sáttmálanum. MEGD var á vitjan í Tofta skúla, har næmingar fingu kunning um arbeiðið hjá MEGD og hvussu tað er at liva við breki, um hugburð og møguleikar.

3 Formansfundir

17. sept. var formansfundur, har hvørt felag fekk høvi at seta orð á framstig og avbjóðingar í arbeiðinum, og hvørji hjartamál, tey arbeiða við. Sera áhugavert var at hoyra um stóra virksemið í limafeløgunum - um ymisk og fjølbroytt, men eisini felags mál, sum tey arbeiða við. Stimbrandi var at hoyra um mál, sum feløgini hava arbeitt við, og sum eru komin uppá pláss.

4 Lógararbeiði

MEGD fær nógv lógaruppskot og kunngerðir til hoyringar. Fyri ársskiftið komu fleiri kunngerðir til hoyringar í samband við lógina um Almannatrygd og tænastur. MEGD sendir hoyringarsvar til øll lógaruppskot, sum koma til felagið, hóast hoyringarfreistin í summum førum er stutt.

5 Rættindi og luttøka

5.1 Samskiftisdepil

MEGD hevur í fleiri umførum víst á, at tað vanta tilboð til fólk, sum hava tørv á stuðul at samskifta. MEGD hevur víst á, at ein Samskiftisdepil eigur at verða settur á stovn í Føroyum, har fólk kunnu venda sær, óansæð um talan er um sjón, hoyrn, talu, rødd, kognitión, at lesa og stava ella tøknilig hjálpartól. Ein samskiftisdepil hevur vanliga tilboð um útgreinan, ráðgeving, undirvísing og at veita hjálpartól innan samskifti.

5.2 Bústaðarviðurskiftir

Ein stórur tørvur er framvegis at útvega egnaðar bústaðir til fólk við breki, serliga í Tórshavn. Tað gongur sera seint, og vónar MEGD, at ferð kemur á bygging av vardum bústøðum, sambýlum og bústovnum til fólk við serligum tørvi. MEGD fegnast, at í januar vóru tilboðini at byggja heimið í Kvíggjartúni til børn og ung við autismu latin upp, og vónandi fer arbeiðið at ganga skjótt.

5.3 Atkoma

5.3.1 Atkomuligar matstovur

MEGD ynskti at vísa á týdningin á atkomuligum matstovum í Føroyum, har fólk í allan juni mánaða kundu senda MEGD uppskot um atkomuligar matstovur út frá atkomu sum heild, atkomu til vesi, møguleika fyri at fáa laktosu- og glutenfrían mat og góð parkeringsviðurskiftini. Tær matstovur, sum uppfyltu krøvini, fingu ein lykil á høvuðsinngongdina. MEGD fegnast um góðu undirtøkuna, og at tað runt um í Føroyum eru fleiri atkomuligar matstovur.

5.3.2 Atkomuligir túrar í føroysku nátturúni

ÍSF og Fólkaheilsuráðið høvdu á sumri 2020 átak at fáa føroyingar at røra seg. Átakið var avgreitt í samstarvi við Sona og Pól Sundskarð. MEGD hevði fund við Pól Sundskarð um at lýsa atkomuligar túrar fyri fólk við rørslutarni. Undir teiginum TORLEIKASTIG á pol.fo eru lættari túrar lýstir, har fólk við rørslutarni kunnu ganga ella koyra.

5.3.3 Bussarnir atkomuligir

Strandfaraskip Landsins kunnu nú bjóða øllum, sum koyra við Bygdaleiðum komandi sjey árini, eina dygdargóða tænastu við umhvørvis- og brúkaravinarligum bussum, og nú kunnu allir bussarnir frá sáttmálabyrjan 1. mai 2020 taka koyristólar.

5.3.4 Luttøka á arbeiðsmarknaðinum

Føroyar fingu í 2012 Løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, har lógin fevnir um tiltøk, ið stuðla undir eitt virkið arbeiðslív hjá persónum, sum hava ella kunnu fáa trupulleikar við at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin (§ 1). Lógin fevnir eisini um tiltøk, ið fyribyrgja avleiðingar av langtíðarfráveru frá arbeiði vegna arbeiðsloysi, sjúku el. a. (Stk. 2). Landsstýriskvinnan í almannamálum legði sparingaruppskot fyri tingið at broyta lógina. MEGD, fleiri limafeløg og onnur gjørdu vart við, at tey ikki tóku undir við uppskotinum, grundað miss av vunnum rættindum um sáttmálaløn og lønarmiss.

Sambært Samgonguskjalinum 2019-2023 skulu .....*arbeiðstilboð til persónar við skerdum førleikum verða raðfest, og almennir stovnar skulu ganga undan við arbeiðstilboðum*.

Fólk hava verið glað fyri skipanina og fegnast MEGD um økingina av fólki í arbeiðsbúgving. Vónandi kann góða gongdin við fleiri arbeiðstilboðum halda fram komandi árini.

MEGD vil mæla til, at tað kemur ein lóg í Føroyum, sum áleggur arbeiðsgevarum rímiliga tillaging, soleiðis at einstaklingar, sum bera brek fáa útvegað umstøður og hjálpartól, sum tey kunnu vera virkin

á arbeiðsmarknaðinum. MEGD hevur víst á, at sambært lóg, sum bannar mismuni á arbeiðsmarknaðinum[3], skulu klagur um mismun stílast til Javnstøðunevndina, sum viðger klagur um mismun millum kvinnur og menn. MEGD hevur víst á, at ein heldur skal kunna klaga til ein myndugleika, sum hevur við brek at gera so sum kærunevndina í Almanna-, familju- og heilsumálum.

5.4 Verja og rætt at atkvøða

16. september 2020 samtykti Føroya Løgting lógaruppskot um at broyta løgtings- og kommunuvallógina. Tað er ein mannarættur at kunna velja til løgtings- og kommunuval, og fegnast MEGD um, at okkara áheitan varð gingin á møti. Við lógarbroytingini verður skarin av persónum, sum hava valrætt og eru valbærir til kommunuval, víðkaður til eisini at fevna um persónar, sum eru undir verjumáli og hava mist løgræði eftir verjumálslógini § 6. Lógarbroytingin hevur eisini við sær, at ein veljari, sum einsamallur ikki er førur fyri at greiða atkvøðu á ásettan hátt, kann krevja, at annar av persónunum, sum veitir honum hjálp, skal vera ein persónur, sum hann sjálvur vísir á.

MEGD heitti í hoyringarskrivinum á Føroya Løgting um at gera somu broyting í stýrisskipanarlógini, so persónur, sum er undir verjumáli og hevur fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6, eisini fær valrætt til løgtingsval.

5.5 Verkfall

Tá verkfall var í 2018 var støðan á brekøkinum alt annað enn góð. Fólk vóru noydd at flyta úr egnum heimi, orkan á stovnunum, ið hóast íkomnu støðuna enn vóru virknir, var rættiliga skerd, borgarar mistu stuðulin heima og rættin til náttarvakt, og verkfallið rakti børn, ið bera brek í fólkaskúlanum. Borgarar hava vent sær til MEGD við stúran um komandi lønarsamráðingar. MEGD vendi sær í 2019 til Kristinu Háfoss, landsstýriskvinnu, Anniku Olsen, forkvinnu í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum og Jógvan Philbrow, formann í Føroya Pedagogfelag við áheitan um avtalur um undantøk.

Løgtingsfólk viðgjørdu fyrispurning hjá Brandi Sandoy til landsstýriskvinnuna í almannamálum á tingi 12.02.2020 um málið, og semja var um, at her má okkurt henda.

MEGD samskifti í 2020 við Jørgen Niclasen, landsstýrismann í fíggjarmálum og var í juni 2020 á fundi við Vinnumálaráðið, Helga Abrahamsen, landsstýrismann í arbeiðsmarknaðarmálum.

MEGD bjóðaði 27.01.2021 teimum trimum aðalráðunum og landsstýrisfólkunum Helga Abrahamsen, Jørgen Niclasen og Elsebeth M. Gunnleygsdóttir til fundar at umrøða hesi viðurskifti. Sum skilst er ein tilgongd byrjað at fáa avtalur í lag á arbeiðsmarknaðinum.

Vónandi gongur ikki alt ov long tíð, tí byrgjast má fyri, at sama støða, sum hendi undir verkfallinum í 2018, ikki kemur fyri aftur.

5.6 Fyritíðarpensjón og gjald fyri heimahjálp

MEGD var gjørt vart við, at gjald fyri heimahjálp er kostnaðarmikið hjá fyritíðarpensjónistum, tí gjaldið er grundað á samlaðu inntøkuna hjá hjúnunum. MEGD hevur heitt á myndugleikarnar at bøta hesi

[3] Løgtingslóg nr. 63. Frá 26. Juni 2011 um at banna mismuni á arbeiðsmarkanaðinum orsaka av breki https://logir.fo/Logtingslog/63-fra-26-06-2011-fra-at-banna-mismuni-a-arbeidsmarknadinum-orsakad-av-breki

viðurskifti soleiðis, at mótrokning millum hjún verður strikað, og at inntøkuloftið verður hækkað. MEGD fegnast um, at nýggj kunngerð varð samtykt, sum bøtir um hesi viðurskifti.

5.7 Framtíðarfullmakt

MEGD hevur 04.03.2020 sent áheitan til AMR, landsstýriskvinnuna í almannamálum, um at fáa fyriskipanina við framtíðar fullmakt setta í gildi í Føroyum. Í Danmark ber til at stovna framtíðar fullmakt, har ein sjálvur kann velja, hvør skal umboða ein, um ein ikki longur kann røkja síni fíggjarligu ella persónligu áhugamál orsakað av sjúku, viknaðum andsevnum ella líknandi[4].

5.8 Negativ renta

Limafeløg hjá MEGD hava gjørt vart við, at tey leggja nógv orku í at samla pening inn til sjálvbodna arbeiðið, og er tað lítið hugaligt at skula gjalda negativa rentu av innsavnaða peninginum. MEGD sendi tí Betri og BankNordik umbøn um fund at umrøða negativa rentu og um aðrir møguleikar vóru. MEGD var á fundi við stjóran í BankNordik 27.01.2021, sum segði, at tað vóru aðrir møguleikar fyri almannagagnligar felagsskapir tvs, at limafeløg kunnu hava nakað av innistandandi peningi, áðrenn tað útloysir negativa rentu. Niðurstøðan á fundinum var, at tey vildu venda aftur við kunning, tá endaliga avgerðin um upphæddina, sum útloysir negativa rentu fyri almannagagnligar felagsskapir, fyrilá.

6 Korona

Korona hevði stóra ávirkan á lívið hjá fleiri, sum bera brek, tá samfelagið varð afturlatið. Virknistilboð, frítíðartilboð, venjingartilboð og umlættingartilboð lótu aftur, og vitjan á stovnum varð avmarkað. Fyri fleiri merkti hetta størri einsemi og ørkymlan. Longri bíðilistar til skurðviðgerðir høvdu við sær, at fólk máttu bíða, sum sostatt hevði neiliga ávirkan á teirra førleika.

7 Ymiskt

Norðurlendskt samstarv

HNR Handikapporganisasjonenes Nordiske Råd

Ísland hevur havt formansskapin í HNR (Handikaporganisationernes Nordiske Råd) 2019-2021, og komandi tvey árini hevur Noregi formansskapin. Tey, ið sita sum umboð fyri tey Norðurlendsku meginfeløgini eru formenn/kvinnur og aðalskrivarar í meginfeløgunum. Orsakað COVID-19 hava allir fundirnir í 2020 verið á TEAMS. Rapportin, sum HNR hevur staðið fyri, at lýsa arbeiðsmarknaðin fyri

[4] Keldur: Lov om fuldtidsfuldmagter: https://www.retsinformation.dk/Forms/R0710.aspx?id=180174
Familieretshuset: https://familieretshuset.dk/fremtidsfuldmagt/fremtidsfuldmagt
Alzheimerforeningen. Dk https://www.alzheimer.dk/nyheder/2017/fremtidsfuldmagten-traeder-i-kraft-1september/

persónar við breki í teimum norðurlendsku londunum er liðug, og verður útgivin av Nordens Velfærdscenter.

Rådet för Nordiskt samarbejde hevur verið virkið síðan 2013. Tóra við Keldu, forkvinna umboðar MEGD í ráðnum, og Jónvør Christiansen, aðalskrivari er tiltakslimur. Tóra hevur verið á fundum í ráðnum á TEAMS. Í desember vóru Tóra, Jónvør og Doris Bjarkhamar, AMR á talgildum fundi við Mariu Montefusco, fráfarandi seniorráðgeva og skrivara í Nordens Velfærdscenter, har støðan viðvíkjandi brekpolitikki og støðuni hjá fólki, ið bera brek í Føroyum, varð umrødd. Í februar 2021 fara forkvinnan og aðalskrivarin á norðurlendskum fund um menning av tjóðarætlanum fyri brekpolitiskum virkisætlanum.

Umboðan í Ráðum og nevndum í Føroyum

Dugni
Tóra við Keldu umboðar MEGD í ráðnum fyri Dugna.

Ráðið fyri ferðslutrygd
Tóra við Keldu umboðar MEGD í Ráðnum fyri ferðslutrygd.

Javnstøðunevndin
Í samband við kærur um mismun á arbeiðsmarknaðinum skal MEGD hava umboð í arbeiðinum at viðgera kærur sambært lóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum. Jónvør Christiansen, aðalskrivari umboðar MEGD í nevndini og Tóra við Keldu er varaumboð.

Psykiatriska sjúklingakærunevndin
Fyri MEGD situr Sámal Lindenskov, sálarsjúkrarøktari og dagligur leiðari á sambýlinum í Eysturstræti.

03/02/2021/Jónvør Christiansen, aðalskrivari